VIÐMERKING

# Hjálandahugur

Mannbjørn Jacobsen

Stóra hjálandatíðin verður vanliga hildin at byrja við ensk, fronsku hjálanda-royndunum í Norður-amerika og aðrar staðir í heiminum, í Afrika, í ein-støkum førum í Suður-amerika og størri og smærri oyggjum og oyggjaflokkum kring um á heimshøvunum. Fyrimyndin fyri hesi upp-bygging var stóra rómverja-ríkið í fornøldini, grikska sjóveldið beint áðrenn, rík-ið hjá Karl Stóra og í mið-øldini spanska og portugis-isku heims og sjóvøldini.

Í veruleika vardi henda tíð stutt. Byrjaði stutt áðrenn fronsku kollveltingina, til fram ímóti aldarskiftinum seinast, tá flestu størru økir undir europeiskum stjórn-um og krúnum vóru sjálv-stýrandi ella vanlig fræls lond. Seinast at tosa um heimsveldir í týdninginum, stórir partar av øðrum heimslutum stýrdir bein-leiðis frá høvuðsstøðum í Europa, er til beint aftaná seinna Heimsbardaga, tá hetta ikki varð hildið, at vera rætt longur í vanligu fólkahugsanini. Beinleiðis viðtøkur vóru nú í altjóða stovnum móti slíkum, td. ST samtyktir.

## Yvirvaldsroyndir í Europa

Til nýggjastu tíð, er enn galdandi í ávísan mun, er politiska søgan í Europa roynd hjá ymsum størri londum, at vaksa um øki sítt og hervið beinleiðis ræði yvir størri landaøki, og høttan og herseting fyri, at ræða grannar undir vald sítt. Fyrsta var ríkið hjá Karl Stóra miðsavnandi um Frakland, seinasta italska, týska royndin undir øðrum Heimsbardaga.

Við krúningini av Karl Stóra til rómverskan keis-ara, var gamla rómverjarík-ið farið í tvey. Ein víðari-føring av gamla ríkinum, bara við nýggjum høvuðs-staði, og eitt sindur broytt-um siðum, øðrvísi umsiting merkt av mediska stórríkin-um eystanfyri, ovurskriv-stovuvald við krýndum yvirhøvurði, var í Bysans, gekk seinni aftur í triðja Rom, saristiska Ruslandi. Ein víðariføring norðuryvir til germansku, gotisku rík-ini var fyrst til Frakland, seinni til Týskland, og nógv seinni til Ongland og í ávís-um týdningi til USA.

Heimsríkis eyðkenni í týdninginum, alheimshøv-uðsstaður yvir ótaldum fólkasløgum, er her skiftur út við eitt ella nøkur fá einstátta fólkasløg á av-markaðum øki við einum blóðaðali stýrandi yvir staðarbundnum bøndum uttan rættindi. Frælsisrætt-indini í foraldar Grikka-landi, í siðabundnu stovn-unum í Rómvejaríkinum, hvurvu her heilt, bara varð-veitt í hugaheimi av kristn-um munkum á kleystrum, sum umboðaðu mentanina og sjálvandi kristnu ávirk-anina á ein krígsaðal. Fyrst við renisansuni, enðurføð-ingini av fornøldini, hum-anistiska rákinum, kom broyting í so líðandi yvir í demokratiskar stovnar, fyrimyndaðir bæði í stovn-um og øðrum ytri eyðkenn-um, klæðum, almennum bygningum, frá fornøldini í Grikkaland og Rómverja-ríkinum, mest kent frá fronsku kollveltingini og amerikanska uppreistrin-um.

Franska kollveltingin var júst ein uppgerð við ein blóðaðal við honds og høvuðrættindum yvir ogn-arleysum bøndum uttan rættindi, men við skyldu at arbeiða fyri aðalin ein part av árinum. Ein mjúkari skipan av trælaríkjunum í fornøldini merkt av kristnu ávirkanini. Í veruliga týdn-inginum slóðaði hon fyri borgarligu rættindunum, í ytstu møguleikum einari uppgerð við alt valdandi áðrenn, trúgv, siðir, sjálvt ártalið og talskipanina. Av hesum er bara varðveitt tíggjutalskipanin við vaks-andi týdningi av EU sam-skipanunum.

Franska samfelagsskip-anin førdist yvir til Onlands við Vilhelm hertakaranum. Enska kongshúsið og aðal-in førir røtir sínar aftur til Fraklands, til Normandíið, til ætlingar føroyinga, norð-urlendskar niðursetumenn frá víkingatíðini. Henda kongsætt førdi í eina sam-ansjóðing av túsundára rómverjaríkinum og vík-inga útferðalonsul og ævin-týrhug til stórsta risaríkis-skipan í søguna, bretska heimsveldið, nógv seinni.

Hundraðárakríggið um ár 1300 er roynd hjá ensku kongaættina at flyta vald sítt yvir á meginlandið, har hon er ættað. Um helvtin av Fraklandi var longi hersett. Men fekk henda roynd ikki varandi týdning. Hetta var fyrstu og seinastu herset-ingarroynd inn á megin-landið frá bretsku oyggjun-um, um ikki Trafalgar, lítil hálvoyggj syðst í Spania, skal takast upp í tað.

Stutt eftir deyða Karl Stóra datt ríki hansara sundir í høvuðslutar sínar, Frakland, Týskland og Norðuritalia við einum ríki Burgund ímillum Týskland og Frakland longi, sum helst seinni er orsøk til Belgia og Háland. Hervið fer vesturrómverska heims-ætlanin yvir til Týskland í heilaga týsk rómverska ríkið fevnandi um Týskland og Italia, fyrst endaliga avtikið við italsku savning-arroyndunum í 1840 árun-um. Hetta ríkið, næsta ríkið hjá nasistunum, var ongan-tíð ein miðsavnað eind, mest at roknað sum eitt leysari statssamfelag, er helst fyrimynd fyri slík seinni, enska Common-wealth, møguliga saman-beriligt vid EU royndirnar. Týsku og italsku londini stýrdu sær sjálvum vanliga, men viðhvørt, kallaður av einstakum landi ella fleiri í Italia, kom týski keisarin, ella kongurin niður til Norðuritalia við einum stórum heri til at fáa skil á. Hetta gekk seinast aftur í eysturríkska yvirvaldinum yvir Norðuritalia fram til 1861, tá alt Italia savnaðist um ein konga.

Miðøldin, vardi í 1000 ár, merkti at allar størri heims-ætlanir við rómverjaríkin-um hvurvu í smálond við innibyrdum sjónaringi fyri flestu, eitt mentanarljós einast hildið uppi av av-byrdum munkum á einslig-um kleystrum. Hesir ferð-aðust um fyri umframt kristning, at kanna mál og mentan, so teir kunnu sig-ast at verða upphav til øll europeisk størri skrivimál í dag. Fingu helst øll eur-opeisk mál í um ár 1300, tá seinnu europeisku málini longu eru veruleiki. Størsta mál her í samband við kristnu trúnna var frælsing-ina av heilaga landinum í miðeystri, roynd at koma fram á Jesu grøv og yvir-natúrlig merkir harfrá. Hetta var helst eins og mán-aðarferðirnar seinni við til at avlaga nógvan krígshug aðrar vegir, sum annars høvdu verið uppgerðir í Europa um landaøki og krúnrættindi. Ein kendur krígskongi í miðøldini ætlaðist í hvussu so er eina ferð í lívinum ar hava verið í krossferð til heilaga land-ið.

Eins og seinni í stóru hjá-landatíðini, men í nógv minni mun, býttu stórríkir í Europa heilaga landið millum sín, fluttu inn eur-opeiskar lenskipanir og vóru verandi har í yvir hundrað ár, til muhameds-menn, í heilagum krígs-ferðum um somu tíð, riku teir út um ár 1200.

Hesar krossferðir hildu so í minni líki fram í Eur-opa í kristning av granna-fólki sunnanfyri og eystan-fyri. Kristna miðstøði var Frakland og Írland í sam-ljóði við pávakirkjuna í Rom. Herfrá er herferðir inn í Spania frá Fraklandi kent í føroyskum kvæðum um runsevalstríðið og Ólív-ant, undirkúgingin av saks-um í norður Týsklandi og danskar herferðir til eystra-salt.

Við samandettandi róm-verjaríkinum var eitt stutt stórríki av vestgotum í Fraklandi Spania og Týsk-landi. Datt saman í uppgerð við húnar frá Asia. Teir taptu í Fraklandi og búsettu seg í Ungarn. Eitt keltist stórríki var áðrenn Róm-verjaríkið við miðstøði í Sveis og suður Týsklandi. Í uppgerð millum kristni og islam vóru innrásir við var-andi týdningi í Europa, muhamedenanska í Spania, vóru har í 800 ár. Osmann-iska á Balkan, fyrst enda við lok fyrsta Heimsbar-daga. Er enn orsøk til kríggj har.

## Heimsyvirvaldsroyndir

Sponsku og portugisisku stórríkini komu í av tilvild, var ikki ætlað undirlegging av stórum fremmandum londum, spanski kongurin var longi ímóti ætlanini hjá Kolumbus, men lið í roynd at finna stytri veg til fjar-eystur eftir eftirtráðaðum krýddurtum. Ístaðin funnu spaniarir og portugisar eina heila nýggja verð við ein-um fyrr ókendum fólka-slagi. Ístaðin fyri krýddurtir var hópurin av silvuri og gulli skjótt funnið og flutt heim til Spania og Portu-gals. Í samband við kristn-ing av indianum, Kulumbus trúði, at hann var komin til India, lærdu tey indianar spanskt og europeiska mentan, portugisiskt í Brasilia, so heilt stór landa-økir við fleiri stórum sjálv-støðugum londum tosa hesi mál í dag.

Við trúar og valdsupp-gerðunum har í samband við í Europa, framvøksturin av peninga og ídnaðarsam-felagnum fluttist heims-strembanin aftur til norður Europa við útstøði í prot-estantiskum londum. Siða-skiftið í samband við trúar-skiftið broytti heilt hugsan-ina hjá fólki her, so egin-stremban í peningamálum varð dygd, áðrenn varð hon mett synd. Lutur í hesum er handil við trælum frá Afrika, framhildið bæði áðrenn og til nýggjastu tíð av arabum, men ógvuliga stutta tíð í katólska heimin-um, tí kirkjan skjótt var ímóti tí. Trælahaldið steðg-aði fyrst við endan av amerikanska innanhýsis-krígnum í 1864. Eina tíð vóru trælir seldir í Ong-landi og Spania og Portu-gal, men stutt, tí kirkjan var ímóti. Indianar vóru stutta tíð brúktir sum trælir, men megnaðu ikki arbeiði, tí komu svørtu trælirnir frá Afrika, vóru prúðari og sterkari.

Trælabúskapurin var van-ligur í suður Amerika, í Norðuramerika bara á góðsunum í suðurstatinum, ongir trælir vóru í Meksiko. Hesin møguleiki var nú umbroyttur til framleiðslu á góðsum í fátøku heimspørt-unum fyri lítla og onga løn, sum fluttust til Europa til sølu fyri høgan prís, út-vinningur av ráevnum í Afrika og suðureystur Asia fyri lítið og onki til flutn-ings til framvaksandi ídn-aðin í Europa, fyrst tráðídnaðin, seinni tung-ídnaðin. Í hesum viðfangi var byrjandi ídnaður í fá-tæku londunum fyribeind-ur, so ikki kapping kom í harfrá. Dømi her tráðídnað-urin í India.

Tríatiárakríggið fekk var-andi týdning í at býta Eur-opa upp í tvey, protestant-iska vestur og norður Eur-opa og katólka suður Eur-opa. Roynd at vinna yvir hesum skilnaði, sum fram-yvir setti hesi aftur í bú-skaparmenning, er helst høvuðsorsøking til EEC, seinni EU strembanina. Meginlandsroyndirnar, at savnað vald um eitt stórriki við fleiri fólkum viknaðu við sundurfellandi Týsk-landi í smátatir og spjaðing millum katólska suður Týskland og protetantiska norður Týskland. Næsta royndin, at savnast um eitt ríki hevði í nógv minni mun útstøði í norðureystur Týsklandi um Proysen, gjørdist fyrst veruleiki við sigurin yvir Fraklandi í 1871.

Høvuðveldið á megin-landinum var aftur Frak-land í Uppgerð við Ong-land ikki í Europa, men í øðrum heimspørtum, í Norðuramerika serliga. Henda uppgerð endaði við fronskum tapi í øllum før-um. Førdi til eitt enskt Norðuramerika, uttan Quibeque landslutan, men Ongland gekk av við USA helst av somu orsøk.

Av tilvild fekk Frakland eina stutta tíð risaríkisstøðu í Europa. Franska kollvelt-ingin, sum hálshøvdi kong-an og meginpartin av aðal-inum, lat valdið yvir í koll-veltingarherin, skapti valdsstøðuna hjá Napoleon, sum spjeiddi valds sítt víða um í Europa. Við ósigrin-um fyrst við Lútsen, seinni endaliga Waterloo, minkaði Frakland til gomlu natúr-ligu mørk síni. Men ein kollveltingar andi var spjeiddur út, sum enn er virkandi, í dag serliga í fátøku londunum í øðrum heimspørtum.

Lagnuslagið við Sedan bendi áhugan hjá frans-monnum móti Afrika. Frak-land hevur aftaná her ongar stórveldisætlanir í Europa heldur enn Ongland. Tað hevði Týskland harafturímóti í vaksandi mun, í eystur Europa og á Balkan vóru valds og týskingar-royndir, í ávísan mun av dønum í suður Jútlandi.

## Hjálandaroyndir

Skelkurin av Sedan tapin-um, týsku keisarakrúning-ini í Verseilles, bendi Frak-land innyvir, eins og danir stutt áðrenn av tapinum í Suðurjútlandi. Tað løgna er, at fyrst aftaná uppgávu av øllum yvirvaldsroyndum í Europa einsamalt, hereftir var tað í samgongum móti Týsklandi, fekk Frakland ein størri mentanarlut í heiminum við skipan av stóra hjálandaríkinum í Norðurafrika og í fjareystri. Stórur partur af Afrika var nú skjótt beinleiðis stýrdur frá Paris einans steðgað av enskum royndum um somu tíð, fronsk lóg, kirkja, og mál og mentan innflutt her eins og í fjareystri í Viet-nam, Laos og Kambodja. Her er fyrimyndir fyri donsku royndunum í Ís-landi, Grønlandi og Føroy-um. Royndin nú er ikki vanlig herseting við skatt-pláging av undirgivnum, sum annars fáa frið, flutn-ing av virðismiklum málmi til heimlandi í nakran størri mun. Hetta hevði ein gomul yvirstætt, sum ikki ar-beiddi, áhuga í. Royndin er útbygging av ferðslukerv-inum, ávís upplýsing, sum kostar pening. Ætlanin var seinni, at hesi skulu verða før fyri at keypa ídnaðar-vørur frá Europa, at fram-eiða rávørur til europeiska ídnaðin. Ein ávís broyting í politiska mynstrinum fer fram um somu tíð. Franska høgra hevði verið áhugað so seint sum hertøkuna av Meksiko. Nú var eitt íhalds høgra upprunaliga ímóti, tí tað kostaði, lítið útlit vóru í bræði um nakrantíð fyri vinningi, ein framburðs-hugað miðstætt í Fraklandi, radikal, og hóligur vinstra-vongur vóru fyri. Fyri hesi hækkaði mentanarstøði hjá fremmandum fólki við at tey lærdu franskt. Hesin munur var serliga í Frak-landi, í minni mun í Ong-landi, tó eisini til staðar. Her er frágreiðingin uppá støðuna hjá føroyska javn-aðarflokkinum, sum heldur, at føroyingar eru ómentaðir í málið og mentan síni. Donsk sosiallóggáva, danskt mál, og aðrir danskir siðir fara at hevja Føroyar fram til meginlands ment-anarljós. Hetta er eitt kat-ólski heimurin lokkar við við EU.

*framhald á síðu 9*



**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 1473, Sp/f Jóhannes Haraldsen, 360 Sandavágur.

Viðtøkur broyttar: 23.07.2001.
Nýtt navn: P/F Heimabakaríið Sandavágur
Stjórn:
Farin frá sum stjóri: Johannes Frants Haraldsen, 360 Sandavágur.
Innkomin sum stjóri: Jóhannes Eir Guðjónsson, 360 Sandavágur.
Grannskoðari:
Farin frá sum grannskoðari: P/F Grannskoðaravirkið Inpact, R. C. Effersøesgøta 26, 100 Tórshavn.
Innkomin sum grannskoðari: P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.

Skráseting Føroya tann 28. august 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

Skrásetingar-nr. P/F 931 P/F Varðin, 510 Gøta.

Viðtøkur broyttar: 23.06.2001
Kapitalur: Hækking við kr. 12.040.000,00 til kr. 20.740.000,00
Inngjaldingarháttur: Kr. 12.040.000,00 við grunshækking.

Viðtikið 23.06.2001 at lækka partapeningin við kr. 2.680.000,00 til kurs 100 til at seta í grunn, eftir at proklama er runnin.

Skráseting Føroya tann 28. august 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi partafelag:**

Skrásetingar-nr. P/F 3224
Navn: P/F Greengate Incoming
Adressa: Undir Bryggjubakka 3, 100 Tórshavn

Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 28.06.2001
Viðtøkudato: 28.06.2001
Kapitalur: Kr. 500.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 500.000,00 til kurs 100.
Stovnarar: Marni Hjallnafoss, Eiriksgøta 12, 100 Tórshavn og Fríðunn Hansen, Traðarbrekka 4, 100 Tórshavn.
Nevnd: Naina Eydna Jacobsen, 430 Hvalvík (formaður), Helga Foldbo, J. Paturssonargøta 3, 100 Tórshavn og Magni Arge, Borgartún 2, 160 Argir.
Stjórn: Marni Hjallnafoss, Eiriksgøta 12, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður bundið við undirskrift av allari nevndini saman.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 28.06.2001 - 31.12.2001
Endamál: Endamál felagsins er skipan og søla av ferðum við serligum atlitið til ferðing í Føroyum.

Skráseting Føroya tann 24. august 2001

Kristin Balle

---


Norðurlandahúsið í Føroyum

Sí SVF tekstvarp s. 650

Grannskoðan • Ráðgeving
Bókhald • Skattamál
- og annað



Sosialurin - 311820

RASMUSSEN & WEIHE
STATSAUTORISERAÐ GRANNSKOÐARAFELAG P/F
An associated firm of

Á GLAÐSHEYGGI - BOX 30
FO-110 TÓRSHAVN - P/F NR. 267
*TEL. (+298) 311017 - FAX (+298 311018)*
*e-mail: rasmussen@rasmussen.fo*
*Heimasíða: www.rasmussen.fo*

**Barnasjónleikarfelagið Dramaverkstaðið**
Hallarheygur 2, FO 100 Tórshavn
Tlf. 316028, 311983
E-mail: hjck@post.olivant.fo
httt:http://kort.olivant.fo/~hjck/

**Drama/sjónleikarskeið fyri børn, ung og vaksin**

Á Dramaverkstaðnum á Hálsi í Havn, verða skeið í drama og sjónleiki fyri ung og vaksin.

Undirvíst verður í ymiskum lærugreinum, sum geva innlit og hegni í sjónleikarlist.

Skeiðini eru fyri skúlaárið 2001- 2002. Byrjað verður í viku 36.

Børn: Fyri alt skeiðið kr. 2.000,-

Tey 14 ára gomlu og eldri eru undir Kvøld og Ungdómsskúlanum.

**NB: Tey yngstu skulu vera fylt 9 ár áðrenn 01.09.2001**

**Byrjarar/Eitt sindur roynd**
9 - 12 ár Mánadag kl. 15.00 - 16.50
13 - 15 ár Hósdag kl. 15.15 - 18.45
13 - 15 ár Mikudag kl. 15.15 - 18.45

**Byrjarar/Roynd**
16 ár og eldri Mikudag kl. 18.00 - 21.30
(Kann evt. broytast)

**Nógv roynd (Framhaldsbólkur. Fá pláss og vit mangla nærum bara dreingir)**
14 - 16 ár Hósdag kl. 18.00 - 21.30
(Kann evt. broytast)

**Tilmelding: Tlf. 316028**
**millum kl. 16.00 og 18.00**

**Suðuroyar Sjúkrahús**
**800 Tvøroyri**

Søkt verður eftir fysioterapeutum til fulltíðarstørv frá 1. oktober 2001.

Løn sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og Fysioterapeutfelag Føroya.

Nærri upplýsingar viðvíkjandi størvunum fáast við at venda sær til John Rødgaard yvirfysioterapeut tlf. 371133 lokal 115.

Umsókn við avriti av prógvum v.m. verða at senda til:

**Umsjónarmannin**
Suðuroyar Sjúkrahús
800 Tvøroyri

innan 17. september 2001.

Sosialurin Sosialurin -har tað hendir

**LBF søkir verkfrøðing**

Vit søkja ein dugnaligan verkfrøðing til spenn-andi projekterings- og eftirlitsuppgávur innan byggi- og anleggsfakini.

Nærri upplýsingar fáast við at ringja til Hanus Hansen á telefon 314744.

**Landsbyggifelagið P/F, Ráðgevandi Verkfrøðingar**
Postboks 228
Grønlandsvegur 5
110 Tórshavn

**Bilførari**

Søkt verður eftir bilførara til at byrja skjótast gjør-ligt. Stóra koyrikortið er neyðugt.

Áhugaði kunnu venda sær til okkara á telefon 314650 og tosa við Claus Mørkøre.

**P/F Poul Michelsen**

FØROYA PEDAGOG FELAG

**Broyttar telefontíðir**

Frá 1. sept. eru telefontíðirnar í felagnum soleiðis:

Mánadag til og við hósdag kl. 10.00-16.00.

**Føroya Pedagogfelag**

**Bónus í Havn**
**søkir eftir starvsfólkum**

**Vit hava brúk fyri einum fólkið at arbeiða fulla tíð**

**Eisini hava vit brúk fyri nøkrum røskum hjálparfólkum at arbeiða aftaná skúlatíð**

**Umsókn við møguligum prógvi og viðmælum skulu sendast til Bónus skjótast gjørligt**



**Bónus Í Tórshavn**
**Postrúm 1059**
**FO-110 Tórshavn**